**Nr. 13/2015**

**Kári P. Højgaard**
**løgtingsmaður**

**Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a**

**Fyrispurningur um útgjald úr Samhaldsfasta, settur Kristinu Háfoss, landsstýriskvinnu (at svara skrivliga eftir TS § 52a)**

1. Hvussu nógvir persónar, sum búgva uttanlands, fáa útgoldið úr Samhaldsfasta?
2. Hvussu verður ávirkanin á inngjald/útgjald úr Samhaldsfasta, tá grunnurin, sum skuldi verða ískoyti til pensjónina, nú verður tann berandi grundstuðulin?
3. Fara allir pensjónistar, sum í dag fáa útgjald úr Samhaldsfasta, at fáa sama ágóða av hækkingini?
4. Hvørji stig fer landsstýriskvinnan at taka, til tess at greiða mismunin millum pensjón og Samhaldsfasta, tá føroyingar, sum hava arbeitt í Grønlandi ella Danmark, venda heimaftur at búgva og eru fyri vanbýti?
5. Er tað almennu Føroyar, sum eiga Samhaldsfasta og hava ræðisrættin, ella eru tað partarnir á arbeiðsmarknaðinum?
6. Um arbeiðsmarknaðurin eigur Samhaldsfasta, og politiska skipanin áleggur stýrinum, hvat skal útgjaldast, og fráboðar, at hereftir skal pensjónin í størri mun liggja uttanfyri landskassan og gjaldast av arbeiðsmarknaðinum, er talan tá ikki um ognartøku av grunninum?
7. Er nakar møguleiki fyri, at samgongan tekur uppskotið um lækking av grundupphæddini í fólkapensjónini aftur og bíðar, til fráboðaða breiða semjan er veruleiki á ólavsøku 2016?

**Viðmerking til spurning 4:**
Um føroyingur hevur búð í Danmark ella Grønlandi og flytir heim til Føroya at búgva, eru ongir trupulleikar sambært galdandi pensjónskipan. Brotpensjón er ikki galdandi innan fyri ríkið, so tískil fær viðkomandi fulla fólkapensjón eftir føroyskari lóggávu.
Fyri at fáa fult útgjald úr Samhaldsfasta krevst hinvegin, at ein hevur verið 40 ár á føroyska arbeiðsmarknaðinum, tí at brotpensjón er galdandi fyri samhaldsfasta innan fyri ríkisfelagsskapin. Hevur ein t.d. búð og arbeitt 20 ár uttanlands, fær viðkomandi bert hálvt gjald úr samhaldsfasta. Hetta er eisini galdandi fyri persónar, sum hava goldið fult gjald til grunnin, síðan hesin varð stovnaður í 1991.

**Á Løgtingi, 9. desember 2015**

Kári P. Højgaard